# Ole Ivars fyri fyrstu ferð í Føroyum




*Ole Ivars og dansitónleikurin er ein lívsstílur, siga teir í Ole Ivars, nú teir eru í Føroyum fyri fyrstu ferð. Teir hava eisini tikið teirra egna Ole Ivars-bil við á ferðina. Frá vinstru er tað Tore Halvorsen, Ole Andreas Ødegård, Arild Engh, William Kristoffersen, Arne Willy Foss, og Bjørn Elvestad*



*Teir dáma væl at skemta, mennirnir í Ole Ivars. Eitt nú spurdu teir á tíðindafundinum, um blaðfólkið var komið fyri at samráðast um fiskimarkið við Noreg, ella um talan kanska var um kvoturnar*

**Mangur føroyingurin man hava bíða spentur hesar seinastu dagarnar, eftir at tað gjørdist greitt, at kendi norski dansibólkurin Ole Ivars kemur til Føroyar at spæla til dans. Og nú eru teir so komnir, og spæla teir á tveimum støðum hetta vikuskiftið**

TÓNLEIKUR
*Hans Kárason Mikkelsen*
*mikkels@fas.harvard.edu*

Norðmennirnir í Ole Ivars hava verið vælumtóktir í Føroyum og norðanlondum í nógv ár. Teir fingu sítt gjøgnum brot í 60'unum, og teir hava síðani sitið tungt á dansitrónini í Noreg og aðrastaðni.

Nú eru Ole Ivars og teir komnir til Føroyar, og eitt av teimum londunum, har Ole Ivars hava verið væl dámdir, eru júst Føroyar.

- Teir eru nógv tann mest spældi dansibólkurin í Útvarpi Føroya, sigur Elis Poulsen, sum er persónligur vinur við limirnar í Ole Ivars.

Fríggjadagin hevði Ole Ivars tíðindafund uppi á Hotel Føroyum, og tað er Mentanarhúsið, sum skipar fyri. Konsert var fríggjakvøldið í Mentanarhúsinum, og í kvøld spæla teir til dans í høllini á Hálsi.

Sjálvt um Ole Ivars eru serstakliga populerir í Føryum og í Noregi, so hava tað eisini verið truplar tíðir hja dansibólkinum.

Ole Ivars fekk sítt gjøgnumbrot í 60'unum, men 70'ini vóru slakar tíðir hjá Ole Ivars. Í Noreg gekk ikki væl at selja plátur, og í Føroyum tónaði Ole Ivars ikki so ofta í Útvarpinum.

- 70'ini vóru truplar tíðir fyri Ole Ivars og fyri dansitónleik sum heild. Í Útvarpi Føroya varð ikki nógvur dansitónleikur spældur, og eg haldi orsøkina partvís vera, at útskifting av fólki varð í Útvarpinum, sigur Elis Poulsen, sum plagar at lata Ole Ivars tóna av og á.

## NRK ger film um føroyaferðina

Men agurkutíðin er yvirstaðin hjá Ole Ivars og dansitónleikin, tí teir eru betri umtóktir enn nakrantíð. Hesi seinastu árini hava teir fingið ymsar tónleikavirðislønir, og har ímillum eisini ta størstu í Noregi, nevniliga "Årest Spelband" sum teir fingu í 1999.

Aftanfyri Ole Ivars stendur eitt stórt plátufelag, sum er tað størsta í Noregi, tá tað kemur til dansitónleik. Teir hava megnað at ført Ole Ivars fram í Noregi, og áhugin fyri Ole Ivars í heimlandinum er ógvuliga stórur.

Heilar tvær sjónvarpsrásir vóru á tíðindafundi á Hotel Føroyum fríggjadagin. Umframt Sjónvarp Føroya, so var norska sjónvarpsrásin NRK eisini við á tíðindafundi, og hetta ber boð um, at norðmenn eru spentir at frætta frá Ole Ivars. NRK skal nevniliga eisini gera ein film um føroyaferðina hjá Ole Ivars.

Ole Ivars og teir eru eisini nógv umbidnir, tí teir fáa áheitanir um at spæla næsta hvørt vikuskiftið.

- Tað klárar man ikki í longdini, at spæla 200 leygardagar um árið, siga teir skemtandi í Ole Ivars.

## Skuldu koma til Føroyar í 60'unum

Í Føroyum hevur Ole Ivars bert spælt einaferð, og tað var fríggjakvøldið. Annars hevur ætlanin leingi verið, at Ole Ivars skuldi koma til Føroyar at spæla. Hetta varð í 60'unum, men tað varð av ongum. Orsøkin til avlýsingina er ókend, men teir vóru ógvuliga nógv umbidnir hetta tíðarskeiðið.

Tað varð eisini afturi í 60'unum, at alt byrjaði, og av fyrsta tíð var talan um eitt kjallaraband, sum menti seg nógv. At enda eydnaðist teimum at fáa ein lítlan platusáttmála í lag, har teir fingu loyvi til at innspæla eina royndarplátu.

Fyrsta plátan seldi ikki væl, umleið 80 eintøk vóru tikin av hyllunum. Men seinni í 60'unum kom ferð á, og plátusáttmálarnir blivu størri og størri.

Tann best umtókti sangurin hjá Ole Ivars er ivaleyst "Jeg trodde englarne fanst" sum flest allir føroyingar kenna.

Elis Poulsen kennir eisini henda sang, tí ofta hevur hann syrgt fyri, at hesum hevur ljóðað kring landið.

Men nú verður so møguligt at hoyra Ole Ivars og einglarnar beinleiðis í høllini á Hálsi leygarkvøldið, sum eisini er síðsta konsert hjá Ole Ivars í Føroyum í hesum umfarinum.






# Til Azorurnar við útróðrarbáti



*Oddmar Juul Samuelsen er føroyski stigtakarin til verkætlanina, har føroyskir fiskimenn fara til Azorurnar at royna eftir dýrum fiski*
*Mynd: Jens Chr. Vang*

**Tær komandi vikurnar fara føroyingar til Azorurnar, har ætlanin er at seta seg á ein part av fiskivinnuni. Stjørnin á Azorunum hevur víst áhuga fyri at fáa føroyskar fiskimenn til landið, og nú hevur eitt privat portugisiskt felag fingið avtalu í lag við føroyingar**

FISKIVINNA
*Hans Kárason Mikkelsen*
*mikkels@fas.harvard.edu*

Tað byrjaði afturi í 70'unum, og nú eru tað aftur fleiri menn, sum halda, at tað er skilagott at fara til Azorurnar at fiska við útróðrarbáti. Møguleikin hevur nevniliga boðið seg aftur, tí eitt portugisiskt felag, sum í nógv ár hevur havt samstarv við føroyingar, vil fegið seta í gongd við einum seks til átta bátum.

Í fyrsta umfari er talan um útróðrarbátar, tað vil siga 30-40 fót bátar. Og menn eru spentir at fara, tí ES hevur gjørt stórar íløgur í fiskivinnuna. Millum annað hevur ES bygt nýmótans havnir, soleiðis at olja og ísur er lætt at fáa fatur á.

Men áðrenn føroyskir útróðarmenn fara við bátum sínum til Azorurnar, skulu fiskiumstøðurnar á Azorunum kannast. Tískil hava tveir føroyskir útróðarmenn tikið stig til, at ferðast til Azorurnar fyri at kunna seg um ymisk viðurskifti, ið knýta seg at fiskivinnuni.

Oddmar Juul Samuelsen er føroyski stigtakarin til verkætlanina, og tað er hann, sum hevur havt kontakt við portugisiska felagið. Oddmar Juul Samuelsen fer ikki sjálvur avstað sum útróðrarmaður, men fer at skipa fyri verkætlanini.

- Vit vóna, at henda verkætlanini fer at strekkja seg yvir nógv ár. Portugisiska felagið vil hava bátarnar í drift skjótast gjørligt, tí teir hava so nógvar gamlar bátar, og tískil vilja teir hava eina útskifting við nýmótans bátum úr Føroyum, sigur Oddmar Juul Samuelsen.

Stjórnin á Azorunum vil fegin hava samstarv við føroyska fiskivinnu, kanska serliga tí, at talan er um eitt oyggjaland sum Føroyar. Azorurnar hava eina líknandi statsrættarliga støðu sum Føroyar, tí teir hava nevniliga eisini eina heimastýrislóg.

Meðan Azorurnar og Føroyar líkjast á nøkrum økjum, so eru oyggjalondini ymisk á øðrum. Til dømis hava Azorurnar eitt annað veðurlag enn tað føroyska, tí vanligi hitin liggur um 18-22 gradir. Hetta er av fiskimonnum mett at vera hóskandi hiti.

Botnurin við Azorurnar er eisini ymiskur frá tí, sum vit kenna í Føroyum. Botnurin er nevniliga vulkanskur, og tískil mást tú seta fiskilínuna upp á ein annan hátt, soleiðis at tú ikki missir línuna.

So tað kann vera trupult at byrja fiskivinnu á nýggjum stað, og tískil fáa føroysku fiskimennirnir góðar sømdir. Teir báðir fyrstu útróðrarmennirnir, sum nú fara til Azorurnar, fáa fígging at byrja við frá portugisiska felagnum.

Oddmar Juul Samuelsen, føroyski samskiparin, sigur við Sosialin, at áhugin millum føroyskar fiskimenn hevur verið serstakliga stórur. Og tað er ikki bert millum útróðrarmenn, at útmeldingarnar hava verið góðar, síðani Oddmar Juul Samuelsen kunngjørdi, at hann fór undir fiskivinnu við Azorurnar.

- Tað er áhugi frá línubátum, krabbabátum, og trolarum, so teir stóru eru eisini áhugaðir í hesum her, sigur Oddmar Juul Samuelsen.

Ætlanin er í fyrsta umfari, at tað skal vera línu- og snelluveiða. Men tað er eisini møguligt at royna eftir krabba við rúsum.

Fiskasløgini við Azorurnar eru ikki tey somu, sum vit hava í Føroyum. Talan er um ein nokkso dýran fisk, og eitt av fiskasløgunum, sum føroyingar fara at royna eftir, er svørðfiskur. Eftirspurningurin er stórur eftir fiskasløgunum við Azorurnar, tí fiskurin verður brúktur lokalt, og tey mangla fisk. Azorurnar er vanliga eitt jarðarbrúksland, og tískil er ikki so nógvur fiskur á marknaðinum.

Og meðan nógvur fiskur ikki er á marknaðinum, so er stórt havøki at fiska á. Tað er eitt 200 fjórðinga sjómark runt um Azorurnar, líka sum í Føroyum, men har er ongin landgrunnur, og tískil er størri vídd at fiska á.

So vónirnar hjá Oddmari Juul Samuelsen er góðar, og hann vónar, at henda verkætlanin fer at bera við sær, at føroysk fiskivinna kann vinna sær gróðrarlíkindi við Azorurnar.

Útróðrarmenn fara úr Føroyum til Azorurnar komandi dagarnar, og fyrsta línan verður helst sett innafyri næstu vikurnar.

